# Sjón úr Íslandi vann

*"Vann eg kom eg í eitt gott selskap. Tað eri eg longu tí eg eri instillaður saman við nógvum góðum høvundum, men vinni eg, komi eg í bólk við tey, ið hava vunnið fyrr. Nakað sum hevði verið stuttligt við at vunnið, var at eg kundi gjørt høvundarnar øvundsjúkir í Íslandi. Tað kundi eg flent eftir í eina viku ella tvær"*

Sjón í samrøðu við Politiken (áðrenn han vann)

BÓKMENTAVIRPISLØN
*Kim Simonsen*

**Norðurlenska Bókmentavirðislønin fór til Íslands í ár. Vinnarin varð Sjón, ið vann við skaldsøguni "Skugga-Baldur". Sjón er stytting fyri Sigurjón Birgir Sigurðsson. Hann er føddur í 1962. Longu sum 16 ára gamal fór hann at skriva yrkingar og útkom við bókini "Sýnir" í 1978. Í árunum sum fylgdu útgav hann sjey yrkingasøvn, ið vóru útgivin savnaði í 1986 í bókini "Drengurin með röntgenaugum" (Drongurin við røntgeneygunum). At byrja við útgav Sjón sjálvur sínar bøkur og varð tí kendur sum ein undurgrundyrkjari**

Sjón var sum yngri ein partur av bólkinum Medusa, ið var ein bólkur av yngri høvundum í 1970inum og 1980inum, ið vóru ávirkaðir av surrealismuni.

Nevndin fyri Virðislønina tók til, at: "Skugga-Baldur javnvigar flott millum poesi og prosa. Skaldsøgan setur motiv saman frá íslenskari søgn, romantiskum frásøgukynstri og eina hugtakandi søgu, har okkara tíðar etisku spurningar taka seg upp.

Í 1987 útkom fyrsta skaldsøgan "Stálnótt" (Stálnátt). Í 1989 útkom "Engill, pípuhattur og jarðaber" (Eingil, høgur hattur og jarðber). Tað var nú mest við triðu skaldsøguni, at hann gjørdist kendur. Bókin "Augu þín sáu mig" (Eygu tíni sóu meg) gjørdi hann kenda sum skaldsøgurithøvund eisini. Bokin varð týdd til danskt, finskt, norskt, svenskt og onnur mál. Eftir hesa bók útkom annar partur av hesi skald-søguni "Með titrandi tár".

Sjón hevur við hesum skaldsøgunum roynt at endurskapt 20. øld. Hann brúkar eitt religiøst sjónarhorn og sum aðrir íslenskir høvundar, sum brúkar hann íslenska søgn, men eisini krimi, film og teknifilm.

### Instillaður til Oscar

Sjón hevur eina fortíð sum høvundi at stuttsøgum, barnabókum, sjónleikum og hann hevur skrivað tekstir til m.a. Björk og The Brodsky Quartet. Hann skrivaði tekstir til filmin hjá Lars von Trier "Dancer in The Dark" í 2001, har Björk sang og leikaði. Fyri hetta avrikið varð hann instillaður til ein Oscar.

Skaldsøgan Skugga-Baldur er frá 2003, hon er fimta skaldsøgan hjá Sjón. Í hesi søguni fer hann á ferð niður í íslenskar søgur. Navnið Skugga Baldur kemur frá einum óndum anda ella einum myrkum trølsligum og óhugnaligum fólki. Baldur Skuggason er høvuðspersónurin, hann er lúnskur og tolir ikki dagsins ljós sum menniskja. Hesin persónurin broytist, men er tó løgin og illavorðin.

Bókin er bert 123 síður long og er skrivað, so at hon bæði er prosa og poesi. Hetta er ikki ein løtt bók at lesa, tí hon er rættuliga absurd og samstundis hevur Sjón fyri, at skriva sera torskilt.

# Svanar og dunnuungar

## Bókmentavirðislønin hjá Norðurlandaráðnum 2005

**Ísland hevur sent Einar Kárason og Sjón. Noreg hevur ein sterkan kandidat við Karl Ove Knausgård og hansara stóru skaldsøgu "En tid for alt" og kenda yrkjaran Stein Mehren. Svøríki hevur sum vant góðar høvundar við í ár í kappingini. Serliga er skaldsøgan hjá Majgull Axelsson "Den jag aldrig var" ein møguligur vinnari í ár. Danmark hevur sent tveir avantgarduhøvundar, ið helst ikki hava nakran størri kjans. Simon Grotrian og savnið "Korstogets lille tabel" er sera torført at lesa. Teir flestu ummælarar tora væl at viðganga, at teir ikki skilja Grotrian. Onkur heldur, at hann er sálarliga sjúkur. Hitt umboðið fyri Danmark er skaldsøgan hjá Kirsten Hammann "Fra smørhullet", ið er dømi um eina (serliga) danska postmodernismu frá 1990inum, tá hon er mest keðilig.**



*Sjón*

BÓKMENTAVIRÐISLØN
*Kim Simonsen*



Danskir høvundar verða hildnir at vera teir keðiligastu í Norðurlondum. Í ár hava danir so aftur provokerandi sent tvey avstað, ið júst í ovurmáta umboða, hvat tey í Svøríki og Noreg finnast at donskum bókmentum fyri, at hesar bókmentir er ólesilig mimalminimalistisk stuttprosa.

Í 2005 eru 11 uppskot frammi til bókmentavirðislønina hjá Norðurlandaráðnum. Millum tey 11 sum kappast um at fáa hesa heiðursløn, er føroyingurin Tóroddur Poulsen. Virðislønin verður latin vinnaranum á fundi í Norðurlandaráðnum í Reykjavík í oktober. Tóroddur er innstillaður fyri yrkingasavnið "Eygnamørk", ið Mentunargrunnur Studentafelagsins hevur útgivið. Skjótt kemur mentanarnevnd Norðurlandaráðsins at hava sín árliga fund, tá verður almannakunngjørt, hvør hin hepni vinnarin er. Bókmentavirðisløn Norðurlanda-ráðsins 2005, sum er uppá kr. 350.000 danskar krónur.

Við í ár eru nógv kend nøvn. Í norðurlenskum høpi eru fólk sum Sjón (Í), finska Rakel Liehu, Einar Kárason (Í), Majgull Axelsson (S).

Mikudagin koma vit so at fáa at vita hvør fær stóra heiðurin í ár. Í fjør vann finski Kari Hotakainen sera óvæntað, sjálvt um eg haldi at bókin var sera stuttlig og væl skrivað.

### Danir spenna fót fyri seg sjálvar

Í Danmark sita Peter Laugesen og Marianne Ping Huang í nevndini. Serliga Peter Laugesen er ein kendur danskur yrkjari sjálvur. Møguligani er tað tí, at tey í ár hava valt høvundar sum

Kirsten Hammann og Simon Grotrian. Tey siga, at Simon Grotrian er valdur tí hann bæði umboðar avantgarduna í 1960inum, barok og at hann hevur ein serligan form. Hesin formur, er so hermetiskt lokaður, at tað er nærum ógjørligt at opna hann:

Jeg ønsker at være dit mørke
og ekspropriere rosinhavet.

Skilpaddeskjoldet
ved Hebrons forsagelse.

Solen går stønnende ned over manden
der høster bronzele
du er klædt på i kærtegn
en himmel (...)

Bókin hjá Kirsten Hammann "Fra smørhullet", er óvanliga ótolandi lestnaður:

Se, Søren og Mette. Søren bor i et hus, og Mette bor i et hus. Søren og Mette bor i et hus. Nej de bor i en lej-lighed. På en vej. Nej, i en gade, A.ma.li.e.gade.

Skaldsøgan snýr seg um Mette, sum hvørki er serliga klók ella býtt, serliga mentað ella ónd, góð ella politisk. Hon mistrívist í síni stóru íbúð á Amaliegade i Keypmannahavn. Hon er ein rættuliga keðiligur persónur, ið sær realitysendingar í sjónvarpinum. Hon etur ov nógv slikk og tá maðurin Søren (sum í lesibókini Mette og Søren) rýmur, gerðst hon desperat og fer at umhugsa lívið. Men mátin hon skrivar er rættuliga løgin. Eg hoyri til tað slagið av kritikara, ið ongantíð havi tolt Kirsten Hammann. Eg skilji ikki, hví danir ikki hava instilla Lars Frost og óføru skaldsøguna hjá honum "Smukke biler efter krigen" ella Christian Jungersen "Undtagelsen". Við hesum bókunum høvdu teir haft ein kjans. Báðar hava vunnið óført av prísum og selja sera væl, men hetta er kanska tað sum er galið?

### At møta tí enska

Norðurlenska øki er sera lítið og tí er lætt, at enskamerikansk mentan kemur at yvirtaka av nógv rúm. Eitt endamál við hesum prísinum er tí at: "bryde med den strøm af angelsaksisk littera-tur, der tager hyldepladsen i de nordiske boghandlere og at ud-brede kendskabet til litteraturen i norden«, hetta tók Marianne Ping Huang.

Mangt løgið er hent við hesi virðisløn, m.a. varð Henrik Nordbrandt instillaður tríggjar ferð, áðrenn hann fekk virðislønina í 2000 fyri yrkingasavnið 'Drømmespor'. Seinni fekk norski høvundin Jan Kjærstad endeliga hesa virðislønina fyri sína skaldsøgutriologi um Jonas Wergeland.

### Øll vinna

Tað er ein heiður, at verða innstillaður til hesa virðisløn. Høvundin fær henda heiður, forlagið og sjálvur stovnurin sum gevir hana.

Ummælarin hjá Politiken Mikkel Bruun Zangenberg viðgjørdi m.a. Tórodd Poulsen, Stein Mehren og Anna Halberg í einum ummæli, hann helt, at:

"To ældre, slidte mænd og en slagkraftig og køn ung kvinde - det er næsten, som om de tre nordlige lyrikkandidater til Nordisk Råds Litteraturpris mimer den hjemlige valgkamps gebrækkeligheder, og måske også de opløftende takter."

Hann helt, at Tóroddur minti um Anders Fogh Rasmussen. Og Stein Mehren heldur hann er ein ræðuligur yrkjari, ið er verri enn Mogens Lykketoft sum politikari. Best dámdi honum svenska yrkjarin Anna Hallberg. Sum heild dámar honum Tórodd, kanska mest í mun til "det norske statskoryfæ Stein Mehren, der sidste år fik den prestigiøse Gyldendal-prisen for 'Imperiet lukker seg'. Hann heldur at hesar yrkingar eru: